## Reiður typti kaminuna



Tað var eftir øllum at døma eitt fuglareiður, sum gjørdi, at ein 60 ára gomul kona og tvær ommudøtur hennara í lítla danska býnum Råhede doyðu fyrrakvøldið. Oljufýringin stóð frá, tá tær tríggjar løgdu seg at sova, men av tí at kaminan var typt, slapp roykurin ikki út, og úrslitið varð, at tær tríggjar doyðu av roykeitran. Løgreglan í Ribe sigur við JydskeVestkysten, at eitt fuglareiður var í kaminuni, og at tað var ivaleyst tað, sum typti kaminuna.

## Læra av íslendingum

Grønlendski landsstýrismaðurinm í uttanríkispolitiskum viðurskiftum, Aleqa Hammond, hevur boðið íslendska uttanríkisráðharranum, Ingibjörg Sólrún Gísladóttir til Nuuk at vitja. Aleqa Hammond sigur við grønlendska útvarpið, at tað er ikki annað enn rímiligt, at grønlendingar tosa við sínar grannar, nú landið gongur ímóti sjálvræði, og hon ivast ikki í, at grønlendingar kunnu læra av íslendingum. Ætlandi verður vitjanin fyrst í nýggja árinum.

# Stórur áhugi fyri Høganes-ætlanini






- Vanliga veksur fiskurin skjótari uppundir endan av tíðini, hann verður aldur, og tí er enn ógjørligt at siga, um munur fer at síggjast á toski av Føroyabanka og toski av landgrunninum, sigur Mikkjal Hammer

**Hópur av fólki var á Runavíkar Sjómansheimi leygarmorgunin og lýddi á - og sóu myndir - nú Høganesætlanin, sum fer at rúma umleið 1000 fólkum, varð løgd fram**

BYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Enn er ov tíðliga at siga, hvussu stórur áhugin verður at byggja, men í øllum førum er greitt, at nógv fólk hava áhuga í sonevndu Høganes-ætlanini hjá Nes kommunu.

Hetta vísti undirtøkan, sum framløgan fekk leygarmorgunin.

Ein heilur hópur av fólki vóru møtt upp at síggja ætlanina og hoyra, hvat tey, ið standa aftanfyri hana, høvdu at siga.

Tað er umleið eitt ár síðan, at ætlanin fyrstu ferð varð løgd fram á almennum fundi, og nú var so enn ein framløga - við meira kjøti á enn áður - á Sjómansheiminum í Runavík í morgun.

### Fyrsta byggistig

Framløgan var í sambandi við, at fyrsta byggistig í ætlanini, sum fevnir um 29 sethús og fýra íbúðarflokkar, er við at koma undir land.

Ætlandi verður spakin settur í undir Høganesi 1. apríl komandi ár.

Tey, ið stóðu fyri framløguni, vóru borgarstjórin í Nes kommunu, umboð fyri arkitektarnar, Munin, Skyn og umboð fyri Føroya Banka.

Meira verður at lesa í Sosialinum týsdagin um hesa stóru og forvitnisligu verkætlan.



*Umboð fyri Nes kommunu vóru ovfarin av stóru undirtøkuni, sum framløgan á Runavíkar Sjómansheimi leygarmorgunin fekk*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Høganes-ætlanin er ótraditionell og forvitnislig, og í blaðnum í morgin fara vit at umrøða hana nærri*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*